*At enda høvdu fyriskipararnir eitt yvirraskilsi til gallagestirnar. Tey høvdu fingið stjórarnar báðar og tveir av nevndarlimunum uppá pallin at syngja eitt lag, sum Uni Arge hevði skrivað. Hetta var ein sera góður endi á kvøldinum. Her síggja vit Sigmar Jacobsen, Jóhan Páll Joensen, Janus Petersen og Suna Schwartz Jacobsen meðan teir syngja.*



gongdina hjá Føroya Banka og hjá Sjóvinnubankanum fram til samanleggingina.

Beint undan steðginum kom ein av okkara fremstu sangarinnum, Lena Andersen, eisini á pallin. Hon sang ein eitt lag, og var hon eisini sera væl móttikin hetta kvøldið.

Síðani kom maturin inn á borðið. Hetta ver eitt lætt ábit á einum borðiski. Meðan gallagestirnir ótu, spældu Brekku Brothers lættan jazztónleik.

## Undirhald fyri allar pengarnar

Eftir steðgin byrjaði Lena Andersen seinna partin við enn einum lagi.

Tá Lena er liðug at syngja, verður triði og síðsti filmurin vístur á stórskermi. Hesin var um støðuna hjá bankanum í dag. Hann legði dent á, hvar bankin er nú, og hvussu gongdin hevur verið síðsta árið hjá Føroya Banka.

Tá hesin filmurin var liðugu, kom løtan, sum flest øll høvdu bíðað eftir. Jacob Haugaard og Finn Nørbygaard komu inn á pallin, og teir undirhildu snøgt sagt fyri allar pengarnar.

- Ja, hasir báðir danirnir vóru stuttligir. Jacob Haugaard hevur jú røtur í Føroyum, so hann royndi seg eitt sindur á føroyskum eisini, og hetta var sera stuttligt. Sum heild haldi eg, at hetta kom sera væl við hjá gallagestunum, og flest øll flentu í kíki eftir skemtingarsomu dønunum, greiðir Johnny í Grótinum frá.

Tá navnframu danirnir høvdu verið á palli, mundu flest øll halda, at nú var liðugt fyri hetta kvøldið. Men enn einaferð høvdu fyrireikararnir eitt yvirraskilsi til gestirnar. Eftir at nevndarformaðurin Jóhan Páll Joensen hevði takkað gestunum fyri kvøldið, fóru fýra mans upp á pallin at syngja ein síðsta sang. Hesir vóru stjórarnir báðir, Janus Petersen og Suni Schwartz Jacobsen og formaðurin Jóhan Páll Joensen og nevndarlimurin Sigmar Jacobsen.

Annað av frásøgufólkunum, Uni Arge, hevði gjørt orðini, meðan Kim Hansen hevði gjørt lagið til sangin. Hesin sangurin var gjørdur serliga til gallakvøldini.

## Okkurt spennandi í væntu

Hetta var bara fyrsta av gallakvøldunum, sum Føroya Banki skipar fyri, og bankin er sera væl nøgdur við fyrsta kvøldið, sum var hildið á Tvøroyri.

- Eg haldi, at alt gekk eftir ætlanini. Skráin bleiv hildin til fulnar, og eg haldi eisini, at allir gestirnir vóru væl nøgdir, tá alt var liðugt. So sum heild má hetta metast sum eitt sera væleydnað kvøld, sigur Johnny.

Sum sagt so vera gallaveitslur aðrastaðni í landinum í vikuni, og í gjárkvøldið var næsta hátíðarhaldið á skránni á Skála. Týskvøldið verður eitt í Klaksvík, meðan Havnin verður karmur um tvey gallakvøld mikukvøldið og hóskvøldið.

- Um alt gongur sum á Tvøroyri, so hava komandi gestirnir veruliga nakað at gleða seg til, tí har var stak hugnaligt, sigur Johnny í Grótinum at enda.

Hann leggur tó afturat, at á tí síðsta gallakvøldinum hóskvøldið verður enn eitt yvirraskilsi. Hann vil tó ikki siga enn, hvat hetta inniber, men sigur, at Føroya Banki hevur eitt yvirraskilsi, sum vónandi verður væl móttikið.



*Óluva Zachariasen og Uni Arge syrgdu fyri, at øll hugnaðu sær. Tey vóru nevniliga vertir hetta góða kvøld í høllini í Trongisvági.*



*Dansarar úr fimleikafeløgum úr Havnini og Runavík dansaðu eftir trummurútmunum*